## DAGSINS MEINING

# Kunnu 80'ini endurtaka seg?

Áttatiárini verða mangan drigin fram sum eitt dømi um eina tíð, har alt fór yvir gevind. Nú er veruleikin sjáldan so svart hvítur sum tað, men greitt er, at nøkur mistøk vóru gjørd, ella rættari sagt, mistøkini lógu mangan í tí, ið ikki varð gjørt.

Inntøkufallið fyrst í 90'unum kom fyrst og fremst frá ringum árum í fiskivinnuni, okkara høvuðsvinnu og legði hettar inntøkufall stein omaná byrðu hjá føroyska búskapinum, ið var tyngdur undir nógvari skuld.

Í dag hava vit eitt vinnulív og ikki minst eina fiskivinnu, sum skyldar lítið í mun til 80'ini. Harafturat hava føroysk reiðarí fingið ein óbeinleiðis rakstrarstuðul í form av skattalætta til sjómenn. Lítil ivi er í, at aftaná nøkur ár, so er líka vítt sum sítt hjá fiskimanninum, tí hýrurnar, ið reiðarin skal gjalda verða eftir einum áramáli lægri enn, um eingin skattalætti var, og bert landskassin situr við sviðiðsoð, meðan reiðaríini hava fingið ein bíligari rakstur.

Hvørji eru so framtíðarútlitini fyri fiskivinnuna? Hvussu kunnu vit verða viss í, at eitt stórt inntøkufall ikki er fyri framman í hesi vinnu?

Føroyskir fiskifrøðingar hava mælt ilt at lækka fiskidagatalið munandi. Formaðurin í Skipanarnevndini fór frá, tí eisini hann mælti til einn minni niðurskurð. Hvat ger Landstýrið? Jú teir koma dragsandi við einum íslendskum fiskifrøðingi, ið fyri at siga tað pent, ikki hevur tær heilt stóru fortreytirnar fyri at vurdera støðuna í Føroyum ella kanska enntá í søltum sjógvi yvirhøvur, men hann sigur tað, Jørgen Niclassen og føroysku reiðarnir vilja hoyra, nevniliga, at eingin grund er til at skerja fiskidagatalið. Fólkaflokkurin er ikki kendur fyri at ganga ímóti stuttíðaráhugamálum hjá reiðarum, og Jørgen Niclassen er eftir øllum at døma einki undantak.

Politiska avgerðin er sostatt, at vit bert skulu lata standa til, meðan sakkunnleikin slær alarm. Ein lítil glotti er fyri framman, tí politiskar røddir hava verið frammi á tingi, ið boða frá, at varisliga fer at verða farið fram í komandi árum, hóast avgerðin er fallin fyri 2002. Vónandi kemur fiskivinnan ikki aftur í somu støðu sum standurin var fyri 10 árum síðani. Løtuviningur uppá bekostning av felags besta er vónandi ein saga blot í føroyskari vinnu og politikki — livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Gyltur møguleiki at loysa knútin viðvíkjandi pensjónum

**Ingeborg Vinther**
*Føroya Arbeiðarafelag*

**- Umráðandi er at fáa gongd á aftur Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirlønarg runnin og uppskot Sambandsfloksins er gongd leið, skulu vit ikki fáa eina »fólkaflokspensjón«, har rík gerast ríkari og fátøk fátakari**



- Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin er einasta loysn, ið tryggjar rættvísa pensjón til øll

- Tá Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin á sinni kom, vóru Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin aftan fyri hesa hugsjón. Nú er Sambandsflokkurin so eisini við

- Tí er at meta sum ein skandala, at Tjóðveldisflokkurin er boygnaður eftir trýsti frá Fólkaflokkinum

Sum áður boðað frá, tekur Føroya Arbeiðarafelag fult undir við uppskoti Sambandsfloksins um, at 400 mill. krónur verða settar í Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin í ár, og aftur 400 mill. krónur komandi ár.

Felagið hevur frá byrjan tikið undir við Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum og metir grunnin sum bestu loysn at loysa eftirlønarspurningin.

FA hevur í brævi til allar flokkar á tingi gjørt hesi sjónarmið greið og heitir á flokkar um at taka undir við uppskotinum.

Flokkar á tingi hava arbeitt við at taka av fólkapensjónina, og ístaðin seta persónliga uppsparing. Ein skipan við persónligari uppsparing máar støðið undan samhaldsføstu pensjónsskipanini og førir við sær øktan stættarmun.

Umframt at kunna flokkar á tingi um greiðu støðu Føroya Arbeiðarafelags viðvíkjandi Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum, er eisini bræv sent landsstýrismanninum Bjarna Djurholm, har tryggingarlógin verður umrødd. Sambært hesi lóg fær t.d. FA ikki sett egna eftirlønartrygging í gongd. Avrit av brævinum er sent øllum løgtingslimum. Á aðalfundi hjá FA tóku Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin undir við, at lógin verður broytt, so FA fær sett eftirlønargrunn á stovn, meðan ikki kom greitt fram, hvat Fólkaflokkurin vil.

### Tjóðveldisflokkurin boygnaði

Politikarar hava nú gyltan møguleika at loysa knútin viðvíkjandi pensjónini. Umráðandi er at fáa gongd á aftur Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin og uppskot Sambandsfloksins er gongd leið, skulu vit ikki fáa eina »fólkaflokspensjón«, har rík gerast ríkari og fátøk fátakari.

Vert er at minnast til, at Samhaldsfasti er ein liðug loysn. Ongum nýtist at fara aftur um aftur ella at byrja alt arbeiðið av nýggjum.

Tá Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin á sinni kom, vóru Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin aftan fyri hesa hugsjón. Nú er Sambandsflokkurin so eisini við.

Tí er at meta sum ein skandala, at Tjóðveldisflokkurin nú vísir seg at bakka út. Sambandsflokkurin er komin við, meðan Tjóðveldisflokkurin er boygnaður eftir trýsti frá Fólkaflokkinum. Hetta, hóast væntast kundi, at Tjóðveldisflokkurin fór at taka undir við uppskotinum, og ikki fór at ganga undir fólkaflokshugsjónina og í navni fullveldisins blaka alt annað yvir borð.

Út frá hesum má staðfestast, at Tjóðveldisflokkurin hevur gloymt sosiala tørvin í samfelagnum. Formaður Tjóðveldisfloksins hevur sagt, at talan kann blíva um »eina ella aðra« samhaldsfasta loysn, men hetta er ikki nóg mikið. Loysnin má verða Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin, sum fakfeløg eisini hava tikið undir við alla tíðina!

Men sigast má í hesum sambandi, at syndarligt hevur verið at hoyra útmeldingarnar frá samgonguflokkunum, tá málið hevur verið til 1. viðgerð í tinginum. Landsstýrismaðurin hevur eisini verið í fjølmiðlunum. Hugsjónin tykist greið. Eftir at málið hevur fingið lidna politiska viðgerð og er grýtuklárt, kann tað fara út til hoyring hjá fakfeløgunum. Hvør skal siga: tá kann tað jú gera tað sama, tí tá er kortini leyst og liðugt!

Men Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønargr unnurin er einasta loysn, ið tryggjar rættvísa pensjón til øll. Tí er umráðandi at fáa gongd á grunnin aftur. Eisini, hóast hetta kanska merkir, at vit skulu gjalda meira.

### Vit endurreistu landið — nú er tíð at bera aftur

Vert er at minnast til, at tað vóru borgarar í Føroyum, sum tóku tøk og endurreistu landið, tá harðast leikaði á í kreppuárunum. Kreppan kostaði meiniga føroyinginum nógv. Og meinigi maðurin lat nógv í ymsum eykagjøldum, t.d. MVG og eykaskatt. Nú er frálíkt høvi at bera eitt sindur aftur til borgararnar, so hesir fáa okkurt aftur.

Hetta er vert hjá politikarum at hugsa um, nú sjónligastu politisku úrslitini seinnu árini eru, at politikarar hava verið óførir at skava til sín sjálvs — bæði í løn og pensjón.

### Val í hondum

Fakfeløgini hava alla tíðina tikið undir við loysnini, ið eitur Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin, tí hetta er einasta trygd fyri rættvísari pensjón til øll.

Vert er tí at minna á, at brátt er val í hondum. Tá ber til at minna veljaran á, hvørji brøgd eru gjørd inniverandi samgonguskeið. Verkafólk telja stóran part av veljarafjøldini og FA ætlar ikki at lata tað fara aftur við borðinum, verður onnur loysn vald, enn Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin. Tá kann tað gerast óheppið fyri teir flokkar, ið ikki taka undir við hesum uppskotinum. FA ætlar at minna limir sínar - og Føroya fólk annars - á, hvat er farið fram, og tá er ikki óhugsandi, at veljarin vaknar, hugsar seg um, so

*Framhald á næstu síðu*


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Landsstýrið vanvirðir bæði Føroya Løgting og Føroya fólk

**Helgi Abrahamsen**



Ikki kann sigast annað enn, at svarini sum uttanlandsnevndin fekk frá landsstýrismonnum í vikuni eru ein vannvirðing av bæði Føroya Løgtingi og Føroya fólki.

Endamálið við arbeiðinum í uttanlandsnevndin er millum annað at veita Løgtinginum tilmæli í øllum uttanríkismálum. Men fyri at kunna gera hetta er neyðugt, at nevndin fær allar upplýsingar um málini, sum eru til viðgerðar.

### Ikki mítt borð

Tá landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálum av nevndini varð spurdur, hvussu landsstýrið hevði roknað seg fram til, at 95 mió. krónur av blokkstuðlinum fara til almanna forsorgina, so svaraði hann heilt einfalt, at tað var ikki hansara stýri, men Løgmansskrivstovan sum hevði gjørt útrokningarnar.

Spurningurin er so, um hetta svarið skal skiljast soleiðis, at landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgd á økinum, ikki hevur ánilsi av, hvussu hetta hongur saman?

Tá sami landsstýrismaður varð spurdur, hvussu fólk fara at merkja yvirtøkurnar, so svaraði hann, at mett verður ikki, at Føroya fólk kemur at merkja yvirtøkurnar.

Um hann ikki veit, hvussu roknistykkið hongur saman, hvussu kann hann tá vita, at fólk ikki kemur at merkja avleiðingarnar?

### Heldur einki um skúlamál

Tá landsstýrismaðurin í skúlamálum varð spurdur, hvussu landsstýrið hevði roknað seg fram til, at 261 mió. krónur av blokkstuðlinum fara til skúlamál, svaraði hann, at Mentamálastýrið ikki hevur verið við í útrokningini, og at hann tí tíverri ikki kundi svara spurninginum.

261 mió. krónur eru nógvir pengar, og landsstýrismaðurin sum hevur ábyrgdina av málsøkinum má vita nakað um, hvussu hetta talið er framkomið.

Um skottið ímillum stýrini er so vatntætt, at tað ikki kann tosast ímillum, hvussu ber tað tá til, at Løgmansskrivstovan hevur roknað hvat almanna- og heilsumál kosta, meðan Fíggjarmálastýrið hevur roknað hvat skúlamálini kosta?

### Politiskt ynski

Landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálum verður síðani spurdur, hví barnaforsorgin ikki er við í yvirtøkunum. Svar hansara er soljóðandi: »Tað er eitt politiskt ynski, at so skal verða«.

Hvat er hetta fyri svar? Spurningurin er ikki um tað er eitt politiskt ynski, men heldur hví landsstýrið hevur valt, ikki at yvirtaka barnaforsorgina. — Men her fekst einki svar. Føroya fólk má einki fáa at vita.

### Fíggjarmálastýrið vil heldur einki siga

Undir fyrstu viðgerð av yvirtøkulógini segði Høgni Hoydal, at danska stjórnin hevur gjørt greitt, at so leingi sum endamálið hjá landsstýrinum er fullveldi, so kann skiftistíðin gerast 4 ár, og at hetta mugu vit fyrireika okkum til.

Víðari segði hann: »Jóannes Eidesgaard sigur, at tað hevur mann ikki nakrar útrokningar av. Jú tað hevur mann, og tað hevur mann eisini havt til viðgerðar í uttanlandsnevndini, tá uppskotið til sjálvstýri Føroya fólks var til viðgerðar.«

### Ikki tey røttu tølini

Rætt er, at uttanlandsnevndin fekk onkra sokallaða »Kravsgreining« (onkur kallar tað rokniark), men tey tølini bygdu á ta fortreyt, at vit skuldu fáa blokkstuðul úr Danmark fram til 2012.

Tí bað uttanlandsnevndin nú Fíggjarmálastýrið um eina kravsgreining, sum byggir á eina skiftistíð yvir 4 ár. Men svarið frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum er: »Landsstýrið arbeiðir ikki við eini skiftistíð uppá 4 ár.«

### Hvat vil landsstýrið?

Landsstýrismaðurin við sjálvsstýrismálum sigur, at vit mugu fyrireika okkum til 4 ára skiftistíð, meðan landsstýrismaðurin við fíggjarmálum siktar framvegis eftir 2012. Báðir umboða teir sama flokk í landsstýrinum.

Føroya Løgting og Føroya fólk fáa einki at vita, og hetta kann ikki góðtakast, tí tað verður vanligi føroyingurin, sum í seinasta enda skal gjalda gyldið.

# Psalmodi Føroyar

**Tíðindaskriv**

Í samkomunum í dag er sera stórur tørvur fyri, at hvør einstakur limur í samkomuni kemur inn í støðuga lovprísan og tilbiðjan, fyri at uppfylla Guds longsul, sum vit lesa um í Johs. 4, 23:

Men tann tíð kemur — og er nú — táið hinir sonnu tilbiðjarar skulu tilbiðja Faðirin í anda og sannleika; tí tað er slíkar tilbiðjarar, Faðirin vil hava.

Í 1983 legði Harrin spíran til Psalmodi á hjartað hjá Tom Inglis, lovsangsleiðara, tá hann persónliga fekk ein longsul eftir at síggja hendan tørvin blíva mettaðan. Hann kendi tað sera neyðugt, at fáa undirvísingina, um at gera lovprísanina til ein lívstíl, út til samkomuna sum skjótast. Besti hátturin at gera hetta, metti hann vera at undirvísa teimum, sum í samkomuni antin høvdu lovsangs- hirða- ella læraratænastu, so tey í síni tænastu kunnu vera við til at seta hetta í verk.

Tað er tí við stórari gleði, at vit kunnu upplýsa, at tann fyrsti Psalmodiskúlin í Føroyum er settur á stovn. Skúlin kemur at húsast í Kelduni í Skálafirði og undirvísingin byrjar eftir ætlan 17. september 2001, har undirvíst verður annaðhvørt mánakvøld.

Tey sum koma at undirvísa eru m.o. Jastrid og Pauli Høj fyristøðufólk í Kelduni, Eyðun Jacobsen lovsangsleiðari og leiðari fyri Psalmodi Føroyar.

Tað er okkara vón og bøn, at hesin skúli má verða mitt í Heilaga Andans leiðslu. Skúlin vendir sær til allar limir á Kristi likami og er sostatt ikki bert fyri kórsangarar ella tónleikarar. Vit trúgva, at Harrin er í ferð við at seta tilbiðjarar til síðis fyri seg sjálvan, og eitt afturvendandi evni á Psalmodiskúlanum verður, at vit menniskju eru skapt til at verða »tilbiðjandi ljóðfør«. Ikki fyrr enn okkara tænasta er fyri Harranum, eru vit brynjaði út til at tæna hvørjum øðrum.

Undirvísingin inniheldur 16 partar og er eitt »must« fyri ein og hvønn trúgvandi sum vil vita, hvat Bíblian lærir um tilbiðjan, og sum ynskjir at skilja, hvat Gud ætlar við at endurreisa templið hjá Davidi í samkomuni í dag. Gjøgnumgangandi er allan vegin, at tilbiðjan má gerast til ein lívsstíl.

*Framhald av næstu síðu*

at hetta kostar onkrum atkvøður.

FA metir tað vera umráðandi at koma við inniligari áheitan á politikarar, um at taka undir við Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum og uppskoti Sambandsfloksins, so úrslitið ikki gerst ein loysn, har stættarmunurin økist. Ein loysn, ið hevur við sær, at fólk, ið hava vunnið mest av peningi í vinnuføra aldrinum, eisini á ellisárum fáa størstu pensjónina. Á tann hátt heldur stættarmunurin í samfelagnum fram, og økist, tá vit gerast eldri.

Føroya Arbeiðarafelag metir, at uppskot Sambandsfloksins er stig á røttu leið at varðveita okkara samhaldsføstu eftirlønarskipan, soleiðis, at tey, sum í vinnuføra aldrinum vinna mest, lutfallsliga gjalda mest til ta eftirløn, ið eigur at vera ein mannarættur, tá tey eldru í okkara samfelag røkka pensjónsaldur. Tað er tí heilt náttúrligt, at løgtingið tekur undir við uppskotinum um, at nevndu 800 mill. kr. verða goldnar í Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirløna rgrunnin.


